# Býráðið

**Dagfesting:** 25.11.2021 kl. 19:00
**Málnr.:** 21/00071-12

Nevndarlimir: Dávur Juul, Eyðun á Lakjuni, Sonni á Horni, Edva Jacobsen, Eivin Breiðaskarð, Magni Jøkladal og Gudny Vang

Tiltakslimir: Lillian Jacobsen, sum møtti vegna Ólavur Larsen, býráðslim, og Leif Andre Eliasen, sum møtti vegna David Andreasen

Ikki møtt:

Onnur:

Nevndarskrivari: Henrik Weihe Joensen, kommunustjóri

| Málsyvirlit | | |
|---|---|---|
| 45/21 | 21/00246-2 | Vatngoymslutangi_Staðseting á havnalagnum |
| 46/21 | 21/00632-4 | Uppskot til broyting av byggisamtyktini fyri havnaøkið, merkt "D". |
| 47/21 | 20/00600-17 | Felags kommunal reglugerð um óljóð frá skipum til góðkenningar |
| 48/21 | 21/00355-65 | Fíggjarætlanaruppskot hjá Fuglafjarðar kommunu fyri 2022 - til 2. og endaligu viðgerð á býráðsfundi 25. november 2021 |
| 49/21 | 21/00648-5 | Lillian Jacobsen innkallað sum tiltakslimur í sambandi við býráðsfundin tann 25. november 2021 kl. 19:00 samsvarandi § 18, stk. 1 í kommunustýrislógini. |
| 50/21 | 21/00649-4 | Leif Andre Eliassen innkallaður sum tiltakslimur í sambandi við býráðsfundin 25. november 2021 |



FUGLAFJARÐAR KOMMUNA ¤ í Støð 5 ¤ FO 530 Fuglafjørður
tlf.: 668000 ¤ teldupostur: info@fuglafjordur.fo

**45/21**
**21/00246-2 Vatngoymslutangi Staðseting á havnalagnum**

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. |
|---|---|---|
| 1 Vinnu- og havnanevndin | 16.04.2021 | 17/21 |
| 2 Vinnu- og havnanevndin | 20.08.2021 | 27/21 |
| 3 Vinnu- og havnanevndin | 17.09.2021 | 39/21 |
| 4 Vinnu- og havnanevndin | 12.11.2021 | 46/21 |
| 5 Býráðið | 25.11.2021 | 45/21 |

**Tilráðing**

| Til viðgerðar í | Vinnu- og havnanevndini. |
|---|---|
| Stutt lýsing | Í sambandi við, at tað til tíðir er trupult at veita nokk av vatni til skipini, so hevur vinnan eitt ynski um at gera ein goymslutanga á havnaøkinum, soleiðis at skip kunnu fáa vatn umborð beinleiðis úr tanganum. Talan er um sóttreinsað vatn frá tí kommunalu drekkivatnsveitingarskipanini.<br><br>**Staðseting og stødd á goymslutanga**<br>Tá hugsað verður um staðseting, so er møguleiki fyri at staðseta ein goymslutanga á økinum við kaihúsið við endan av bygninginum hjá Havsbrún.<br>Kommunan ynskir at tangin ikki kemur upp um takið á bygninginum.<br>Vinnan hevur tørv á einum goymslutanga á umleið 1.400 m3.<br><br>**Góðskutrygd**<br>Tá kommunan hevur latið vatn í goymslutangan, so tekur vinnan yvir og hevur ábyrgdina av vatngoymsluni og góðskuni av vatninum, áðrenn tað kann latast skipunum.<br>Tá talan er um ein goymslutanga aftaná sóttreinsingarskipanina, so mugu ymisk atlit verða tikin í mun til góðskuna á vatngoymsluni. Ein tílíkur tangi kann skapa gróðrarlíkindir fyri bakterium av ymiskum slagi.<br>Ein slík vatnveitingarskipan skal góðkennast av Heilsufrøðisligu starvsstovuni. Eisini mugu mannagongdir gerast í sambandi við at tryggja vatngóðskuna.<br><br>**Ískoyti til fundin í vinnu- og havnanevndini 20. august 2021** |

| | |
|---|---|
| | Avtalað er, at verkfrøðingur kommununar saman við formanninum í vinnu- og havnanevndini taka fund upp við Havsbrún í sambandi við manglandi vatnforsýning til havnaøkið.<br>Málið um størri vatngoymslu hevur verið fyri í teknisku nevnd áðrenn summarferiuna, har umsitingin móttók tilboð frá føroysku veitara uppá ávikavist tveir betongvatngoymslur á umleið 1.400 tons hvør, og ein betongvatngoymslutanga á 3.000 tons. Tá er ventilrekkja og planering ikki við í kostnaðinum.<br>Tosað varð eisni á fundinum um møguleikan við at leggja eina leiðing við sóttreinsaðum vatni frá verandi vatngoymslu og yvir til havnaøkið eftir botninum, soleiðis at kain fekk separata forsýning uttanum býin.<br><br>Umsitingin hevur enn einaferð fingið umsókn frá Havsbrún um at fáa loyvi til at staðseta eina vatngoymslu á umleið 1.400 tons á kaiøkinum t.d. við havnaskrivstovuna. Hendan staðseting er tann skilabesta fyri Havsbrún. Tangin er 14, 2 m í útvendigum diametri, og 10 m høvur.<br>Tankin hjá Havsbrún er at leiða reinsa vatn í tangan frá kommunalu vatnveitingni, og skipa soleiðis fyri, at tað altíð er útskifting í vatntanganum, soleiðis at bakteriur ikki kunnu nørast.<br>Víst verður til tilboð frá Havsbrún uppá ein vatntanga á kr. 1.885,- u/mvg, og uttan planering og botn. Helst hevði samlaði kostnaðurin fyri hesa vatngoymslu verði kr. 2.3 mill.<br>Havsbrún leggur áherðslu á, at tað er sera týdningarmikið fyri virksemið hjá teimum at kunna veita sóttreinsa vatn og tað tænastu, sum skipini treingja.<br><br>**Ískoyti til fundin í vinnu- og havnanvendini 17. september 2021**<br>Umsitingin hevur arbeitt víðari við málinum í sambandi við umsókn um loyvi frá Havsbrún at staðseta ein 1.400 tons vatntanga á økinum við havnaskrivstovuna.<br>Havsbrún bjóðar Fuglafjarðar havn frystihøllina og øki rundanum hana til virksemið hjá Fuglafjarðar havn, soleiðis at pláss verður fyri havnaskrivstovu og goymslu til øll amboðini, sumí dag standa úti í saltrákanum og verða oyðilogd.<br>Havsbrún hevur eitt sterkt ynski um at fáa hesa vatngoymslu á havnalagnum, hetta fyri at servisera skipini, sum koma til kai í Fuglafirði. Hetta fer eisini at tryggja inntøkumøguleikar hjá Fuglafjarðar havn og tryggja verandi góða tænastustøði á havnalagnum.<br>Eisini mælir umsitingin til at fáa gjørda eina virðismeting av frystigoymsluni og av verandi havnaskrivstovu, sum skal verða grundarlag fyri einum býtishandli millum Havnsbrún og Fuglajfarðar havn, og gera eina kostnaðarmeting av at gera eina nýggja havnaskrivstovu í frystigoymslubygninginum H&F.<br><br>**Ískoyti til fundin í vinnu- og havnanevndini 12. november 2021** |



FUGLAFJARÐAR KOMMUNA ¤ í Støð 5 ¤ FO 530 Fuglafjørður
tlf.: 668000 ¤ teldupostur: info@fuglafjordur.fo

| | |
|---|---|
| | Tekniska deild hevur saman við havnastjóranum arbeitt víðari við eini heildarætlan, har arbeitt hevur verið við eini nýggjari staðseting av skrelliplássinum hjá Fuglafjarðar havn.<br>Tað hevur við sær, at plássið uttanfyri havnaskrivstovuna er tøkt til ein vatntanga á økinum.<br><br>**Ískoyti til býráðsfundin 25. november 2021**<br>Málið hevur verið viðgjørt í vinnu- og havnanenvdini 12. ovember 2021. Nevndin heldur ikki, at staðseting av vatntanga á kaini er ein góð loysn, men tá nevndin í Bakkafrost, í fylgi stjóranum á Havsbrún, ikki er sinnað at finna aðraa loysn, samtykti nevndin at ganga umsóknini á møti við tí treyt, at talan er um eina fyribils loysn. Vatnið, sum verður veitt til virkini, verður eftir galdandi takstum, og Fuglafjarðar havn fær inntøkurnar eftir galdnandi takstum, sum fara yvir kaikant.<br>Havsbrún rindar fyri allar útreiðslur av vatntanganum. Vatnið, sum fer úr tanganum er UV-strálað og viðgjørt eftir krøvum frá Heilsufrøðisligu Starvsstovuni, áðrenn tað verður latið umborð á skip v.m.<br>Við í avtaluni er gamla frystihúsið hjá Handils- og Frystivirkinum, har Fuglafjarðar havn fær rakstrargøgnini undir tak. |
| Bakgrund | Betri veitingartrygd av drekkivatni og tænastu til skip. |
| Grundarlag | • **Lógir, reglur, mannagongdir, fordømi, fíggjarligar umstøður og tílíkt**<br>Byggisamtyktin og BK17<br>Heilsufrøðisliga starvsstovan_Lóg um vatngóðsku<br>• **Møgulig fylgiskjøl**<br>FK j. nr. 21/00246-1 Plantekning_Staðseting av vatngoymslutanga<br>FK j. nr. 21/00246-4 Havsbrún_Tilboð uppá betongvatngoymslutanga |

| Viðgerð | | | |
|---|---|---|---|
| Tekstur íð lýsir loysn | Avleiðingar | Stuttíðar | Langtíðar |
| | Fíggjarligar | Ja | Ja |
| | Umsitingarligar | Ja | Ja |
| Tilmæli | Nevndin mælir til, at tekniska deild arbeiðir víðari við málinum.<br><br>**Nýtt tilmæli til fundin í vinnu- og havnanevndini 12. november 2021**<br>Tekniski leiðarin mælir til at ganga umsóknini á møti, har Havsbrún fær loyvi til at staðseta ein vatngoymslutanga á havnaøkinum fyribils, inntil Fuglafjarð kommuna hevur útbygt sínar egnu vatngoymslutangar, | | |



FUGLAFJARÐAR KOMMUNA ¤ í Støð 5 ¤ FO 530 Fuglafjørður
tlf.: 668000 ¤ teldupostur: info@fuglafjordur.fo

| | |
|---|---|
| | soleiðis at Fuglafjarðar havn og býurin annars fær nokk av vatni. Havsbrún rindar fyri allar útreiðslur hesum viðvíkjandi, og at Havbrún rindar sama kostnað fyri vatnið sum yvir kaikant til Fuglafjarðar havn, og at vatnið, sum fer úr tanganum er UV-strálað og viðgjørt eftir krøvum frá Heilsu Frøðisligu Starvsstovuni, áðrenn tað verður latið umborð á skip v.m.<br><br>**Nýtt tilmæli til býráðsfundin 25. november 2021**<br>Tekniski leiðarin mælir býráðnum til at taka undir við samtyktini í vinnu- og havnanevndini 12. november 2021, sum er soljóðandi.<br>Nevndin heldur ikki, at staðseting av vatntanga á kaini er ein góð loysn, men tá nevndin í Bakkafrost, í fylgi stjóranum á Havsbrún, ikki er sinnað at finna aðraa loysn, samtykti nevndin at ganga umsóknini á møti við tí treyt, at talan er um eina fyribils loysn. Vatnið, sum verður veitt til virkini, verður eftir galdandi takstum, og Fuglafjarðar havn fær inntøkurnar eftir galdnandi takstum, sum fara yvir kaikant.<br>Havsbrún rindar fyri allar útreiðslur av vatntanganum. Vatnið, sum fer úr tanganum er UV-strálað og viðgjørt eftir krøvum frá Heilsufrøðisligu Starvsstovuni, áðrenn tað verður latið umborð á skip v.m.<br>Við í avtaluni er gamla frystihúsið hjá Handils- og Frystivirkinum, har Fuglafjarðar havn fær rakstrargøgnini undir tak. |
| Dagf | 12. apríl 2020.<br>20. august 2021.<br>17. september 2021.<br>12. november 2021.<br>25. november 2021. |



**<u>Vinnu- og havnanevndin 16. april 2021:</u>**
Nevndin samtykti, at umsitingin kannar møguleikan fyri at leggja ein nýggjan ø 200 mm vatnleiðing frá vatngoymsluni og oman í býin, soleiðis at vit tá fáa tveir ø 200 mm, sum koma at fóðra býin og kaiøkið, og at umsitingin kannar møguleikan fyri at gera ein goymslutanga úti á Innaradal.

**<u>Vinnu- og havnanevndin 20. august 2021:</u>**
Nevndin samtykti, at tekniska deild arbeiðir víðari við málinum.

**Vinnu- og havnanevndin 17. september 2021:**
Í sambandi við umsókn frá Havsbrún um økið til lýsitangar, so hevur kommunan onki øki tøkt til skrelluplláss. Havnalagið má endurskoðast við eini heildarætlan.

**Vinnu- og havnanevndin 12. november 2021:**
Nevndin heldur ikki, at staðseting av vatntanga á kaini er ein góð loysn, men tá nevndin í Bakkafrost, í fylgi stjóranum á Havsbrún, ikki er sinnað at finna aðraa loysn, samtykti nevndin at ganga umsóknini á møti við tí treyt, at talan er um eina fyribils loysn. Vatnið, sum verður veitt til virkini, verður eftir galdandi takstum, og Fuglafjarðar havn fær inntøkurnar eftir galdnandi takstum, sum fara yvir kaikant.
Havsbrún rindar fyri allar útreiðslur av vatntanganum. Vatnið, sum fer úr tanganum er UV-strálað og viðgjørt eftir krøvum frá Heilsufrøðisligu Starvsstovuni, áðrenn tað verður latið umborð á skip v.m.
Við í avtaluni er gamla frystihúsið hjá Handils- og Frystivirkinum, har Fuglafjarðar havn fær rakstrargøgnini undir tak.

**Býráðið 25. november 2021:**
Býráðið samtykti einmælt (9-0), at taka undir við tilmælinum frá vinnu- og havnanevndini og geva Havsbrún loyvi til at staðseta ein 1.400 tons vatntanga á kaiini nærhendis havnaskrivstovuni, har talan er um eitt áramálssett fyribils loyvi, sum verður skrivað inn sáttmálan við Havsbrún.

6

**46/21**
**21/00632-4 Uppskot til broyting av byggisamtyktini fyri havnaøkið, merkt "D".**

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. |
|---|---|---|
| 1 Vinnu- og havnanevndin | 12.11.2021 | 49/21 |
| 2 Býráðið | 25.11.2021 | 46/21 |

**Tilráðing**

| | |
|---|---|
| Til viðgerðar í | Vinnu- og havnanevndini. |
| Stutt lýsing | Í sambandi við útbyggingarætlanir á havnalagnum í Fuglafirði er neyðugt at gera broytingar í byggisamtyktini fyri havnaøkið, merkt D.<br><br>Víst verður til plantekning nr. 01, sum er sermynd, og til tekning nr. 02, sum er yvirlitskort av allari byggisamtyktini saman við broytingini.<br><br>Talan er um tvey økir. Eitt út frá mjølverksmiðjuni, og eitt út frá fóðurgoymsluni hjá Havsbrún.<br><br>Nevndin skal taka støðu til broytingaruppskotið, har málið síðani verður lagt fyri býráðið til endaliga støðutakan.<br><br>Eftir hetta verður broytingaruppskotið lagt til almenna hoyring, viðmerkingar og eftirlits í 3 vikur. Møguligar viðmerkingar skulu verða inni hjá kommununi innan 6 vikur, roknað frá framleggingardegnum.<br><br>**Ískoyti til býráðsfundin 25. november 2021**<br>Víst verður til undirskrivaðan sáttmála millum Havsbrún og Fuglafjarðar kommunu um havnaútbyggingar v.m., har millum annað sáttmálin tilskilar, hvørji økir talan er um at byggja út, sí FK j. nr. 19/00267-8.<br>Talan er um tvey økir, eitt á 11.584 fermetrar, og eitt øki á 7.945 fermetrar. Økini eru út frá verandi virkisøkið hjá Havsbrún. Víst verður til FK j. nr. 21/00632-1, sum er plantekning nr. 01 sum sermynd av økjunum báðum.<br>Málið um broyting í byggisamtyktini fyri havnaøkið, merkt "D" hevur verið fyri í vinnu- og havnanevndini 12. november, har nevndin samtykti at taka undir við tilmælinum, og at broyta byggisamtyktina sambært kortskjølum. Málið verður lagt fyri býráðið til støðutakan, har broytingin síðani verður løgd alment fram til hoyringar, viðmerkingar og eftirlits. |
| Bakgrund | Í sambandi við útbyggingar á havnalagnum, er neyðugt hjá kommununi at gera broytingar í byggisamtyktini fyri Fuglafjarðar kommunu. |



FUGLAFJARÐAR KOMMUNA ¤ í Støð 5 ¤ FO 530 Fuglafjørður
tlf.: 668000 ¤ teldupostur: info@fuglafjordur.fo

| | | | |
|---|---|---|---|
| Grundarlag | • **Lógir, reglur, mannagongdir, fordømi, fíggjarligar umstøður og tílíkt**<br>Byggisamtykting og BK17<br>• **Møgulig fylgiskjøl**<br>FK j. nr. 21/00632-1 Plantekning nr. 01, sum er sermynd<br>FK j. nr. 21/00632-2 Plantekning nr. 02, sum er yvirlitskort<br>FK j. nr. 21/00632-3 Uppskot til broyting av byggisamtyktini<br>FK j. nr. 21/00632-6 Plantekning nr. 03, sum er verandi byggisamtykt<br>FK j. nr. 21/00267-8 Undirskrivaður sáttmáli millum Havsbrún og kommununa um havnaútbyggingar v.m. | | |
| Viðgerð | | | |
| Tekstur íð lýsir loysn | Avleiðingar | Stuttíðar | Langtíðar |
| | Fíggjarligar | Ja | Ja |
| | Umsitingarligar | Ja | Ja |
| Tilmæli | Tekniski leiðarin mælir til at tikið verður undir við uppskoti til broyting av byggisamtyktini fyri havnaøkið, merkt «D», og at málið verður lagt fyri býráðið til endaliga samtykt, og at broytingin verður løgd alment fram til hoyringar, viðmerkingar og eftirlits.<br><br>**Nýtt tilmæli til býráðsfundi 25. november 2021**<br>Tekniski leiðarin mælir býráðnum til at taka undir við samtyktini í vinnu- og havnanenvdini tann 12. November, har Nevndin samtykti at taka undir við tilmælinum og at broyta byggisamtyktina sambært kortskjølum. Málið verður lagt fyri býráðið til støðutakan, har broytingin síðani verður løgd alment fram til hoyringar, viðmerkingar og eftirlits. | | |
| Dagf | 12. novmeber 2021.<br>25. november | | |



**<u>Vinnu- og havnanevndin 12. november 2021:</u>**
Nevndin samtykti at taka undir við tilmælinum og at broyta byggisamtyktina sambært kortskjølum. Málið verður lagt fyri býráðið til støðutakan, har broytingin síðani verður løgd alment fram til hoyringar, viðmerkingar og eftirlits.

**<u>Býráðið 25. november 2021:</u>**
Býráðið samtykti einmælt, at fylgja tilmælinum frá vinnu- og havnanevndini, og broyta byggisamtyktina fyri havnalagið, merkt D, í sambandi við havnaútbygging.

9

# 47/21
# 20/00600-17 Felags kommunal reglugerð um óljóð frá skipum til góðkenningar

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. |
|---|---|---|
| 1 Býráðið | 25.11.2021 | 47/21 |

## Tilráðing

| Til viðgerðar í | Býráðnum | | |
|---|---|---|---|
| Stutt lýsing | Kommunufelagið hevur sent kommununum í Føroyum eina felags kommunala reglugerð um óljóð frá skipum, sum Kommunufelagið ynskir verður viðgjørd á fyrstkomandi býráðsfundi til góðkenningar.<br><br>Tað er Havnanetverkið hjá Kommunufelagnum, sum hevur gjørt reglugerðina í samstarvi við skrivstovuna hjá Kommunufelagnum, og byggir reglugerðin millum annað á 273 ljóðmátingar í havnum, í bústaðarøkjum og inni í bústøðum kring landið.<br><br>Reglugerðin verður eftirmett í 2023. | | |
| Orsøk til at málið verður viðgjørt | Ljóðmátingar við støði í óljóð frá skipum, ið liggja við bryggju kring landið. | | |
| Grundarlag | • Lógir, reglur, mannagongdir, fordømi, fíggjarligar umstøður og tílíkt<br>**Felags kommunal reglugerð um óljóð frá skipum**<br>**Umhvørvisverndarlógin**<br>**Kommunustýrislógin**<br><br>• Møgulig fylgiskjøl<br>**Teldubræv við felags kommunalari reglugerð um óljóð frá skipum, dagfest 22. november 2021** | | |
| Viðgerð | | | |
| Tekstur ið lýsir loysn | Avleiðingar | Stuttíðar | Langtíðar |
| | Fíggjarligar | Ja | Ja |
| | Umsitingarligar | Ja | Ja |
| Tilmæli | Umsitingin mælir til, at góðkenna fyriliggjandi felags kommunala reglugerð um óljóð frá skipum. | | |
| Dagf | 22. november 2021 | | |



FUGLAFJARÐAR KOMMUNA ¤ í Støð 5 ¤ FO 530 Fuglafjørður
tlf.: 668000 ¤ teldupostur: info@fuglafjordur.fo

**Býráðið 25. november 2021:**
Býráðið samtykti einmælt (9-0), at taka undir við uppskotinum frá Kommunufelagnum um felags reglugerð um óljóð frá skipum.



FUGLAFJARÐAR KOMMUNA ¤ í Støð 5 ¤ FO 530 Fuglafjørður
tlf.: 668000 ¤ teldupostur: info@fuglafjordur.fo

**48/21**
**21/00355-65 Fíggjarætlanaruppskot hjá Fuglafjarðar kommunu fyri 2022 - til 2. og endaligu viðgerð á býráðsfundi 25. november 2021**

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. |
|---|---|---|
| 1 Býráðið | 25.11.2021 | 48/21 |

**Tilráðing**

| Til viðgerðar í | Býráðnum |
|---|---|
| Stutt lýsing | Síðani býráðið samtykti fíggjarætlanaruppskotið fyri 2022 við 1. viðgerð tann 30. september í ár, hava føstu nevndirnar hjá býráðnum saman við umsitingini arbeitt víðari við fíggjarætlanaruppskotinum í niðanfyri nevndu tilgongd:<br><br>• 20. oktober 2021: Evnisdagur 1 hjá býráð og umsiting um fíggjarætlanaruppskotið 2022 í hølum hjá Dugna á Kambsdali.<br>• 27. oktober 2021: Fíggjarnevndin viðgjørdi fíggjarætlanaruppskotið 2022 við støði í evnisdegnum á Kambsdali.<br>• Vikurnar 43, 44 og 45: Føstu nevndirnar hjá býráðnum hava saman við umsitingini arbeitt við fíggjarætlanaruppskotinum fyri 2022.<br>• 18. november 2021: Evnisdagur 2 hjá býráð, saman við fíggjarleiðara og kommunustjóra, um fíggjarætlanaruppskotið 2022, hildin í býráðssalinum.<br>• 22. november 2021: Fíggjarnevndin viðgjørdi fíggjarætlanaruppskotið 2022 við støði í evnisdegi 2 í býráðssalinum. Fíggjarnevndin samtykti á hesum fundi, at tilmæla býráðnum, við 2. viðgerð, at góðkenna fyriliggjandi uppskot til fíggjarætlan hjá Fuglafjarðar kommunu fyri 2022, dagfest 22. november 2021.<br><br>Samanumtikið er høvuðsinnihaldið í fíggjarætlanaruppskotinum fyri 2022 soljóðandi:<br><br>Fíggjarætlanin javnvigar við kr. 142.289.888,-. og er fíggjað við kr. 98.210.888,- í skatta- og avgjaldsinntøkum, kr. 40.379.000,- í rakstrarinntøkum og við kr. 3.700.000,- í innstandandi peningi.<br><br>Inntøkurnar av A og B skatti eru mettar til kr. 68.849.888,- ið er kr. 2.160.000,- lægri enn nettorakstrarútreiðslan á kr. 71.010,000,- |

12

| | |
|---|---|
| | Miðalvøksturin í rakstrinum er 5,5% í mun til fíggjarætlanina í fjør.<br><br>Partafelagsskatturin er mettur til kr. 12.000.000,- ið er 2 mió. kr. lægri enn mett varð í 2021.<br><br>Inntøkurnar frá landinum í mun til kapitaleftirlønir, DIS og FAS, verða mettar til kr. 17.311.000,- sum er gott og væl 1. mio. kr. hægri enn í fjør.<br><br>Rakstrarkostnaðurin av eldrasamstarvinum Nánd verður mettur til kr. 22.717.000,- ið eru knappar 2. mió. kr. hægri enn mett varð í fjør.<br><br>Nettoíløgurnar verða mettar til kr. 24.270.000,- har eitt nú keyp av lendi og fyrireiking av íbúðarbygging, umframt hølið til nýggja læknamiðstøð, um- og útbygging av 64-skúlanum til framhaldsdeild, luttøka í Talgildu Føroyum og útbygging á havnalagnum hava høga raðfesting.<br><br>Ætlanin er ikki at økja um skuldina við at taka upp lán, men at klára rakstur og íløgur uttan lántøku í mun til fyriliggjandi inntøkumetingar.<br><br>Avdráttir av lánum eru lækkaðar nakað til kr. 4.330,888,-<br><br>Skattaprosentið er 21,25 og barnafrádrátturin er kr. 7.500,- fyri hvørt barni. |
| Orsøk til at málið verður viðgjørt | §§ 39 og 53, stk. 2, nr. 2 í kommunustýrislógini, sum eru soljóðandi:<br><br>***§ 39.*** *Fíggjarárið er frá 1. januar til 31. desember. Fíggjarnevndin skal fyri 1. oktober leggja uppskot til fíggjarætlan fyri kommunustýrið.*<br>*Stk. 2. Kommunustýrið skal viðgera uppskot til fíggjarætlan tvær ferðir við í minsta lagi 14 daga millumbili. Fíggjarætlanin skal verða endaliga samtykt í seinasta lagi 1. desember.*<br><br>***§ 53, stk. 2, nr. 2*** *Til tess at landsstýrismaðurin kann røkja sínar eftirlitsskyldur við fíggjarligu viðurskiftinum hjá kommununum, skulu tær lata honum:*<br><br>*2) samtykta fíggjarætlan innan 3 gerandisdagar eftir 1. desember* |
| Grundarlag | • Lógir, reglur, mannagongdir, fordømi, fíggjarligar umstøður og tílíkt **§§ 39 og 53, stk. 2, nr. 2 í kommunustýrislógini**<br><br>• Møgulig fylgiskjøl |



FUGLAFJARÐAR KOMMUNA ¤ í Støð 5 ¤ FO 530 Fuglafjørður
tlf.: 668000 ¤ teldupostur: info@fuglafjordur.fo

| | |
|---|---|
| | **Uppskot til fíggjarætlan hjá Fuglafjarðar kommunu fyri 2022, dagfest 22. november 2021** |

<table>
<tr><td colspan="4">Viðgerð</td></tr>
<tr><td rowspan="3">Tekstur íð lýsir loysn</td><td>Avleiðingar</td><td>Stuttíðar</td><td>Langtíðar</td></tr>
<tr><td>Fíggjarligar</td><td>Ja</td><td>Ja</td></tr>
<tr><td>Umsitingarligar</td><td>Ja</td><td>Ja</td></tr>
<tr><td>Tilmæli</td><td colspan="3">Fíggjarnevndin samtykti á fundi 22. november 2021, at mæla býráðnum til at góðkenna fyriliggjandi uppskot til fíggjarætlan hjá Fuglafjarðar kommunu fyri 2022.</td></tr>
<tr><td>Dagf</td><td colspan="3">23. november 2021</td></tr>
</table>

**Fíggjarnevndin 22. november 2021:**
Fíggjarnevndin umrøddi tølini í teimum ymisku rakstrarstøðunum, og samtykti at mæla býráðnum til at góðkenna fyriliggjandi uppskot til fíggjarætlan hjá Fuglafjarðar kommunu fyri 2022. Fíggjarnevndin ynskti í hesum sambandi, at borgarstjórin kannar møguleikarnar, um stýrið fyri Nánd vil lække núverandi uppskot til rakstrarkostnað fyri 2022. 14

**Býráðið 25. november 2021:**
Býráðið samtykti einmælt (9-0), at fylgja tilmælinum frá fíggjarnevndini og við 2. viðgerð, at góðkenna fíggjarætlanina hjá Fuglafjarðar kommunu fyri 2022.

**49/21**

**21/00648-5 Lillian Jacobsen innkallað sum tiltakslimur í sambandi við býráðsfundin tann 25. november 2021 kl. 19:00 samsvarandi § 18, stk. 1 í kommunustýrislógini.**

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. |
|---|---|---|
| 1 Býráðið | 25.11.2021 | 49/21 |



**Tilráðing**

| Til viðgerðar í | Býráðnum | | |
|---|---|---|---|
| Stutt lýsing | Ólavur Larsen, býráðslimur, hevur forfall til komandi býráðsfund 25. november 2021 kl. 19:00. Eftir ynski frá Ólavi Larsen er tí tiltakslimurin Lillian Jacobsen kallaður inn til býráðsfundin. Henda innkallan sambært § 18, stk. 1 í kommunustýrislógini.<br><br>Lillian Jacobsen er fjórðvaldi limurin á lista Á við 40 atkvøðum í sambandi við kommunuvalið 10. november 2020.<br><br>Býráðið skal – samsvarandi § 18, stk. 3 í kommunustýrislógini - fyrst á fundinum 25. november gera av, um treytirnar fyri innkallan av tiltaksliminum Lillian Jacobsen eru loknar samsvarandi § 18, stk. 3 í kommunustýrislógini. | | |
| Orsøk til at málið verður viðgjørt | Ólavur Larsen hevur forfall til býráðsfundin vegna sjúku. | | |
| Grundarlag | • Lógir, reglur, mannagongdir, fordømi, fíggjarligar umstøður og tílíkt **Kommunustýrislógin, kapittul 3**<br><br>• Møgulig fylgiskjøl **Kunning frá Ólavur Larsen, býráðslimi, í teldubrævi, dagfest 17. november 2021, at hann hevur forfall í sambandi við býráðsfundin 25. november 2021**<br><br>**Samskifti millum kommunustjóran og Lillian Jacobsen í teldubrævi, dagfest 22. november 2021, viðvíkjandi innkallan sum tiltakslimur í sambandi við býráðsfundin 25. november 2021** | | |
| Viðgerð | | | |
| Tekstur íð lýsir loysn | Avleiðingar | Stuttíðar | Langtíðar |
| | Fíggjarligar | Nakað | Nei |

| | Umsitingarligar | Nakað | Nei |
|---|---|---|---|
| Tilmæli | Borgarstjórin mælir til, at Lillian Jacobsen kann taka sæti sum tiltakslimur fyri Ólavur Larsen, býráðslim, í sambandi við býráðsfundin 25. november 2021. | | |
| Dagf | 25. november 2021. | | |

**Býráðið 25. november 2021:**
Býráðið samtykti einmælt, at fylgja tilmælinum frá borgarstjóranum og geva Lillian Jacobsen loyvi til at taka sæti sum tiltakslimur fyri Ólavur Larsen.



FUGLAFJARÐAR KOMMUNA ¤ í Støð 5 ¤ FO 530 Fuglafjørður
tlf.: 668000 ¤ teldupostur: info@fuglafjordur.fo

## 50/21
## 21/00649-4 Leif Andre Eliassen innkallaður sum tiltakslimur í sambandi við býráðsfundin 25. november 2021

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. |
|---|---|---|
| 1 Býráðið | 25.11.2021 | 50/21 |

### Tilráðing

| Til viðgerðar í | Býráðnum | | |
|---|---|---|---|
| Stutt lýsing | David Andreasen, býráðslimur, hevur forfall til komandi býráðsfund 25. november 2021 kl. 19:00. Eftir ynski frá David Andreasen er tí tiltakslimurin Leif Andre Eliasen kallaður inn til býráðsfundin. Henda innkallan sambært § 18, stk. 1 í kommunustýrislógini.<br><br>Leif Andre Eliasen er fimtvaldi limurin á lista F við 26 atkvøðum í sambandi við kommunuvalið 10. november 2020. Fjórðvaldi limurin á sama lista, Sheila S. Sóldal, fekk ikki møtt sum tiltakslimur vegna stødd uttanlanda.<br><br>Býráðið skal – samsvarandi § 18, stk. 3 í kommunustýrislógini - fyrst á fundinum 25. november gera av, um treytirnar fyri innkallan av tiltaksliminum Leif Andre Eliasen eru loknar. | | |
| Orsøk til at málið verður viðgjørt | David Andreasen, býráðslimur, hevur forfall til býráðsfundin 25. november 2021 vegna sjúku. | | |
| Grundarlag | • Lógir, reglur, mannagongdir, fordømi, fíggjarligar umstøður og tílíkt **Kapittul 3 í kommunustýrislógini**<br><br>• Møgulig fylgiskjøl **Teldubrævasamskifti, dagfest 22. november 2021, millum kommunustjóran og Leif Andre Eliasen í sambandi við innkallan sum tiltakslimur** | | |
| Viðgerð | | | |
| Tekstur ið lýsir loysn | Avleiðingar | Stuttíðar | Langtíðar |
| | Fíggjarligar | Nakað | Nei |
| | Umsitingarligar | Nakað | Nei |



FUGLAFJARÐAR KOMMUNA ¤ í Støð 5 ¤ FO 530 Fuglafjørður
tlf.: 668000 ¤ teldupostur: info@fuglafjordur.fo

| | |
|---|---|
| Tilmæli | Borgarstjórin mælir til, at Leif Andre Eliasen kann taka sæti sum tiltakslimur fyri David Andreasen, býráðslim, í sambandi við býráðsfundin 25. november 2021. |
| Dagf | 25. november 2021 |

**Býráðið 25. november 2021:**

Býráðið samtykti einmælt, at fylgja tilmælinum frá borgarstjóranum og geva Leif Andre Eliasen loyvi til at taka sæti sum tiltakslimur fyri David Andreasen.

Fundurin lokin kl. 21:00

Gerðabókin lisin og góðkend.

Dávur Juul

Eyðun á Lakjuni

Sonni á Horni

Edva Jacobsen

Eivin Breiðaskarð

Magni Jøkladal

Gudny Vang

Lillian Jacobsen

Leif Andre Eliasen



FUGLAFJARÐAR KOMMUNA ¤ í Støð 5 ¤ FO 530 Fuglafjørður
tlf.: 668000 ¤ teldupostur: info@fuglafjordur.fo